# Borgarligt Hair

**Sangleikurin Hair, sum skuldi vera so provokerandi, hippiekendur og langhærdur er alt ov ordiligur, borgarligur og stuttkliptur. Hóast glottar eru at hóma, gerst leikurin sjáldan nakað serliga hugtakandi og er hann helst eitt vónbrot fyri nógv**

UMMÆLI
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*
*Myndir: Álvur Haraldsen*

Spenningurin var í hæddini, tá sangleikurin Hair varð frumsýndur fríggjakvøldið. Ikki so løgi, tí sjáldan hava vit sæð eina so áhaldandi marknaðarføring av einum skúlaleiki í Føroyum. Sum ímynd av ungdómsuppreistrinum í 68 og teirra rúsandi, friðarelskandi kærleiksboðskapi átti Hair eisini ríkiliga at kunna tryggjað eitt undirhaldandi og provokerandi kvøld. Familjurnar, gamlir sangleikarar, nøkur serstakliga áhugaði, nøkur fjølmiðlafólk og annars restin av Snobbhill, sum hugdu at sangleikinum hetta kvøldið fingið eisini onkra góða løtu. Men samanumtikið gjørdist føroyska útgávan av Hair sjáldan nakað serliga hugtakandi og helst var leikurin eitt vónbrot fyri nógv. Ein av orsøkunum er uttan iva, at leikurin í veruleikanum var brandaður í hel, langt áðrenn leikararnir nakrantíð komu á pallin, og fingu nakran møguleika at vísa, hvør dugir er í teimum.

### Fjáltraðir leikarar

Uttan mun til, hvussu kendir teir eru, er tað kanska ein veruligur veikleiki við uppruna handritinum, at ongin av sangunum er nakað serliga fangandi og góður. Men tað er ikki nøkur umbering fyri ikki at syngja við fullari megi. Helst hevur tað verið fjáltur á leikarunum, tí røddirnar vóru sum heild nokk so veikar, ella var ljóðið bara ikki nóg hart frá, júst hetta fríggjakvøldið. Einasta røddin, ið veruliga sló ígjøgnum, var røddin hjá Konni Kass Jacobsen, sum hevur ein av høvuðsleiklutunum. Hini sýntust øll at vera rættiliga veik, hóast tey als ikki sungu illa. Kanska er hetta øðrvísi, nú ungu fólkini hava verið á pallinum nakrar ferðir.

### Ljóðið

Størsta syndin á kvøldinum, burtursæð frá lítið áhugaðu áskoðararnum, var ljóðið. Tað sjóðaði og hvein, og ongantíð var



*Mitt í gentunum á Snobbhill, er Konni Kass Jacobsen. Hon er sterkasta røddin í leikinum*



*Búnarnir í leikinum eru sera gjøgnumførdir*



*Tá fólkini í Hair eru skeiv ella deyð, megna dansararnir at skapa sterkastu løturnar í sangleikinum*

tað nóg hart frá. Aftur eitt, ið ger tað rættiliga torført hjá vanliga áskoðaranum at gerast fangaður av einum leiki, ið gongur fyri seg í einum hølum, sum eru kend fyri, at mann næstan ikki klárar at fáa nakað at ljóða illa. Einasta ferðin ljóðið sýntist hóskandi, var einaferð í leikinum, tá ein harður brestur var.

### Stutt hár

Langt hár má vera eitt must, tá leikurin kallast Hair, men dreingirnir eru rættiliga stuttkliptir og hampiligir. Teir flestu eru meira átøkir sunnudagsskúladreingjum, sum í frítíðini eru hippiearar. Kanska tað ikki ørkymlar øll, men tað fær á onkran hátt alt at sýnast eitt sindur tilgjørt. Tað autentiska bleiv á onkran hátt burtur. Tá tann myrki eisini er ein soyasmurdur hvítingur og rúmdarferjan, Columbia, ið verður víst á eini mynd, ikki var úti í rúmdini fyrr enn í 1981, verður tað alsamt torførari veruliga at gerast fangaður.

Tað eru nógv samlaði smáting, ið fáa ein at síggja til, góðan leik at søkka í virði.

### Ikki ordiligir amatørar

Sjálvandi er talan ikki um professionellar leikarar, men í mun til »Jósef og litfagra dreymakotið« er í hesum føri, ein sera stór rekruttering gjørd uttanfyri studentaskúlan. Fleiri av leikarunum hava gingið í studentaskúlanum. Men ein av orsøkunum til, at mann plagdi at vera so hugtikin, hevur til hinar leikirnar verið, at tað vóru næmingar úr skúlanum, sum mann ikki hevði sæð á palli áður. Hesaferð eru fæstu av høvuðsleiklutunum mannaðir av fólki, ið ganga í studentaskúla, og fleiri av andlitunum hevur mann sæð á palli fyrr. Sostatt væntar mann sær á onkran hátt meira av leikarunum, enn tá mann sær nýggj fólk, og tí verður mann eitt sindur vónbrotin, tá tey ikki ordiliga levera vøruna.

### Óskiljandi dialektir

Leikurin er væl umsettur. Men hvat annað hevði mann væntað, tá Dánial Hoydal hevur umsett. Hinvegin eru leikararnir eitt sindur undarliga valdir til summar av leiklutunum. Tveir hippiarar, ið helst altíð hava búð í stórbýnum tosa bygdamál, meðan drongurin av bygd tosar veruligt havnarmál. Har kundi mann á onkran hátt veri eitt sindur snildari, og latið bygdardrongin vera veruligan bygdardrong, og heldur havt aðrar leikarar til stórbýarleiklutirnar. Tá vit brádliga fáa at vita, at tann myrki í leikunum heldur ikki er úr stórbýnum, er ruðuleikin fullkomin. Tí tá hann í veruleikanum, hvørki er myrkur ella tosar



*Tað mest positiva við sangleikinum Hair er dansurin. Tí leikurin er sum heild, eitt vónbrot fyri tey flestu*

bygdamál er onki satt við honum. Ein hvítur høvuðsstaðardrongur spælir ein myrkur av bygd.

Orsøkin til hesa meting, er, at nógvar orðingar í leikritinum veruliga leggja upp til at spæla uppá dialektirnar. So kundi mann veruliga nýtt ríkidømi í máli okkara, sum mann í øðrum førum hevur gjørt tað. Tí vit hava nógvar dialektir á føroyskum, ið kundi verið elegant nýttar at styrkja um persónligheitirnar, samstundis sum leikararnir eru grivnir fram úr øllum heraðshornum.

### Reinleikin skeivleikin

Nakrar veruliga vakrar pallmyndir eru tó í leikinum.

Tá ungdómarnir eru skeivir, sýnist alt á pallinum so reint og vakurt. Sum ein nær deyða uppliving, har mann upplivir ein veldiga rúgvu uppá nøkur splitsekund. Dansararnir sleppa eisini veruliga til sín rætt, og mann kann á ongan hátt taka frá nøkrum í leikinum, at allur dansurin er sera væl skipaður og